

Danny Alexander. Mynd: EPA/ANDY RAIN

# Stórabretland umhugsar lægri oljuskatt í Norðsjónum

**Jógvan Hugo Gardar**

18.03.2015 - 02:25

Oljan.fo

Oljufeløgini sum hava virksemi í bretska partinum av Norðsjónum, sum til dømis Dong Energu, Maersk Oil og Atlantic Petroleum, hava møguliga okkurt at gleða seg til.

Í morgin skal bretska stjórnin leggja fram eitt uppskot um fíggjarlóg, og slaturin vil vera við at stjórnin kemur at skjóta upp at skatturin á oljuvirkseminum skal lækkast í bretska partinum av Norðsjónum.

Tað er BBC sum skrivar at bretar umhugsa at lækka oljuskattin. Umframt at rinda bretska fyritøkuskattin sum er 30 prosent, so rinda tey eisini ein eykaskatt í oljuvinnuni uppá umleið 30 prosent. Talan er um at eykaskatturin nú skal lækast niður til 20 prosent.

Orsøkin er lækkandi oljuprísurin, ið tyngir raksturin hjá oljufeløgunum. Og bretska stjórnin tykist at vilja lurta.

Bretski skattamálaráðharrin, Danny Alexander, sigur sambært BBC, at tað hevur týdning at ein stuðlar vinnuni í hesum tíðum, so hon kemur ígjøgnum hendan aldudalin, uttan at missa stevið.

Skattalætting er hugsaður sum ein íblástur til oljufeløgini, so tey fara at leita meir, tí tað er ein sannroynd at fleiri av teimum stóru bretsku oljuøkjunum eru við at vera tom.

Sambært Financial Times sigur Danny Alexander, at tað hevur stóran týdning at lagt verður til rættis, so virksemið ikki verður steðga, tí tað er ikki ynskiligt at fólk missa størvini nú, meðan bíða verður eftir at oljuprísurin hækkar aftur, og kemur í eina legu sum ger at virksemi hjá oljufeløgunum eisini økist aftur.

Tað er serliga í Skottlandi at óttin er stórur fyri at oljufeløgini fara at siga fólk úr starvi, og at um tey gera tað, so koma tey neyvan aftur.